# Nøvn

## Minnisorð um
# Róa Heinesen
## Bøur

Orð eru fátøk, tá ein familja missir tað allarbesta, hon eigur, ein av sínum kæru. Og at lívstráðurin hjá Róa varð kvettur, áðrenn hann var komin til ungdómsins vár, fær ein enn einaferð at standa spyrjandi, hví lagnan rakar so ógvusliga og fyri okkum órættvíst.

Minnist so væl fyrstu ferð, eg sá Róa, tá hann sum lítil smádrongur saman við foreldrum sínum búleikaðist í Sørvági, áðrenn tey settu búgv í Bø.

Ávegis til arbeiðis møtti eg einum fittum smádreingi við reyðum kjálkum og purlutum hári á veg út eftir vegnum, ið nú er Gerðisvegur. Tó at tað sást, at hann hevði eitthvørt rørslubrek, so slapst ikki undan at síggja ein farra av gleði og treiskni í hansara andlitsbragdi, eins og tú sá eina vinnaratypu, nú hann eina lítla løtu var ein fríur fuglur, helst orsakað av, at hann, uttan at mamman ella pápin vóru varug við tað, hevði sníkt seg út at síggja seg um.

Seinastu tvey árini havi eg koyrt skúlanæmingar, harímillum Róa, millum Bø og Sørvág, og beinanvegin kundi eg staðfesta, at tann myndin, ið eg hevði av tí lítla fitta smádronginum, hevði Rói framvegis, nú hann gekk í 9. flokki. Altíð positivur og gramdi seg ongantíð, tosaði ofta um, hvussu neyðugt tað var at gera skúlatingini, sjálvt um tað tók sína tíð, eins og hann gleddist, tá væl hevði gingist í hond. Eisini tosaði hann um, at fara víðari at útbúgva seg í Havn.

Rói var frá barnsbeinið av ein sannur stríðsmaður, og kom hann við sínum treiskni, tolni og positiva lyndi nógv longri, enn nakar helst hevði torað at vænta.

Við hesum fáu orðum vil eg lýsa frið yvir Róa.

Við djúpastu samkenslu.

**Frank**

# Krabbameinsfelagið nýggjan ráðgeva

Anna Maria Østerø er sett í starv sum ráðgevi á skrivstovuni hjá Krabbameinsfelagnum.

Anna Maria er 37 ára gomul, útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur og hevur fjølbroyttar arbeiðsroyndir. Millum annað hevur hon starvast í Grønlandi og á psykiatriskari deild. Seinastu tíggju árini hevur hon arbeitt á heiliráðsdeild B6 á Landssjúkrahúsinum, sum eisini er skipað við palliativari eind fyri doyggjandi krabbameinssjúklingar. Anna Maria hevur tí drúgvar royndir við viðgerð av fólki við krabbameini og innan palliatiónsøkið, har hon eisini hevur nomið sær førleikagevandi skeið. Umframt hevur hon eftirútbúgving innan familju og sálarráðgeving.

Á skrivastovuni hjá Krabbameinsfelagnum fer Anna Maria at taka sær av at ráðgeva krabbameinssjúklingum og avvarðandi teirra, eins og hon fer at taka sær av øðrum uppgávum.

Anna Maria byrjar í starvinum tann 19. august.




*Birgari Johannessen og Rasmus Rasmussen á Torginum í SMS*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Birgar og Rasmus í SMS

## Mánadagin læt ein fjølbroytt framýning hjá Birgari Johannessen og Rasmusi Rasmussen upp á Torginum í SMS.

Havnarmenninir Birgar Johannessen og Rasmus Rasmussen hava latið upp eina áhugaverda summarframsýning á Torginum í SMS. Talan um eina framsýning við m.a. modellskipum, gomlum leikum frá 50- og 60-unum, fyrr og nú myndum og einum modelli av Havnini, sum er bygt yvir økið frá Tinganesi niðan til Sjónleikarhúsið. Eisini er tann kenda Restorffs samlingin hjá Birgari við øllum sum Restorffs Bryggjarí hevur framleitt frá byrjan til enda.

Av modellskipum kann nevnast at har eru bæði tann fyrra og seinna Norröna, Smyril, sum var bygdur á Tórshavnar Skipasmiðju í 1967, og tann sum kom í 1975 (Morten Mols), Tjaldur hjá Skipafelagnum sum kom í 1953, og strandafaraskipið Ruth hjá Torshavns Mælkeforsyning & Margarinefabrik frá 1908. Við á framsýningini eru eisini klippmyndir hjá Rasmusi Rasmussen.

Framsýningin, sum er søgulig og áhugaverd, verður opin til og við týsdagin 27. juli.

# Merkisdagar

### Gullbrúdleyp

Fríggjadagin 23. juli hava Hergerð og Eiler Samuelsen bakari Klaksvík gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í K.F.U.M & K í Klaksvík frá kl. 19 har øll eru hjartaliga vælkomin.

### Silvurbrúdleyp

27. juli hava Krisfinn og Maria Christiansen, Klaksvík, verið gift í 25 ár. Tey eru burturstødd.

### Silvurbrúdleyp

Týsdagin 17. august hava Jónleyg og Fríðálvur Blá-hamar, Vestmanna, verði gift 25 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 21. august frá kl. 12 til 18 í ítróttarhøllini í Vestmanna. Tey, ið ynskja at gleðast saman við okkum, verða vinaliga biðin um at siga frá innan 4. august á tlf. 424407.

### Silvurbrúdleyp

Mikudagin 8. september hava Alith og Hilmar Djurhus Strendur silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin fríggjadagin 10. september kl. 18 í bygdarhúsinum á Strondum. Tey ið ynskja at gleðast saman við okkum verða vinarliga biðin um, at siga frá innan 24. august á tlf. 448534/224635.

### 90 ára føðingardagur

Leygardagin 17. juli *fylti* Signhild oman Tún úr Froðba 90 ár.

### 90 ára føðingardagur

Leygardagin 24. juli heldur Elisabeth Olsen sín 90 ára føðingardag á Sandáarbreyt 7. Tey, ið vilja heilsa upp á hana, eru hjartaliga vælkomin millum kl. 11 og 15.



### 90 ára føðingardagur

Mánadagin 26. juli verður Astrid Álvheygg 90 ár *(myndin)*. Dagurin verður hildin í Blomstergården, Ventemøllevej 32, st. 39, 4293 Dianalund.

### 90 ára føðingardagur

Mánadagin 26. juli verður Hanna Ziska, Klaksvík, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin á Sjómansheiminum í Klaksvík kl. 18 sama dag. Tey, ið vilja heilsa upp á Honnu, eru hjartaliga vælkomin.

### 75 ára føðingardagur

21. august fyllir Elisabeth Joensen í Vági, fyrrverandi fyrustøðukvinna hjá heimarøktini, 75 ár. Í hesum sambandi bjóðar Elisabeth til brunch í Billiardhúsinum, leygardagin 14. august, frá kl. 10-15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 70 ára føðingardagur

23. juli fyllir Anna Glyvradal, Glyvrar, 70 ár. Vælkomst verður í sjókafeiini í Rúnavík 24. juli kl. 18.